# Nú stendur verri til



Tað er serliga í landsynningshorninum, at tað stóra grótið liggur

Mynd: Nicolaj Falck

**Fyri aðru ferð innan fyri ein mánað liggur fótbóltsvøllurin í Nólsoy undir í runu**

ÓDNARVEÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eisini í Nólsoy merktu tey landnyrðingsbrimið. Og fyri aðru ferð innan ein mánað liggur fótbóltsvøllurin undir í runu og gróti.

Men hesaferð er nógv sum bendir á, at vøllurin ikki sleppur so snikkaleyst sum seinast. Tá, fyri mánaði síðani ella so, bar til at reinsa vøllin aftur fyri runu, og tá var eisini bert talan um smágrót, ið var endað inni á vøllinum.

Sum myndin sýnir, er allur vøllurin undir í runu, og hesaferð er tað stórt grót, sum er skolað inn á vøllin.

Mikkjal Holm, umsjónarmaður hjá Tórshavnar Kommunu í Nólsoy torir als ikki at meta um standin á sjálvum vøllinum, men hann sigur tað ikki koma óvart á seg, um vøllurin hevur tikið skaða.

Hesaferð er skilið nógv verri. Nú liggur stórt grót á vøllinum, og tí undrar tað meg ikki, um skaði er komin á hann, sigur Mikkjal Holm.

Hann er í løtuni eitt sindur í døpurhuga um, hvussu støðan skal grípast ann. Men hann væntar tó, at teir fara at royna at reinsa á sama hátt sum seinast.

Hesaferð er bara talan um so ræðuliga nógv størri upptøku, og er eri rættiliga bangin fyri, at stóra grótið kann hava skrætt hol á vøllin, sigur Mikkjal Holm.



Gourmet



110,-

Canneloni,
krabbi,
jarðkneysar



240,-

Oksalundir,
kompot av soppum,
selleri og sauce-lionaise



105,-

Ananas,
vanilju-birkes ísur
Piñacolada

3 rættir 455,- 2 rættir 350,-

tlf 32 25 25

Gourmet

# Smyril sleit endarnar

**Hann fekk ikki ligið við bryggju í Havn, tí tað var so ókyrt og hetta fer at merkja ferðaætlanina bæði í dag og í morgin**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Smyril kom úr Suðuroy til Havnar í morgun, var so ókyrt, at hann fekk ikki ligið við bryggju í Havnini.

Tað var so nógvur súður í sjónum, at Smyril sleit fleiri endar og tí gjørdi skiparin av at fara frá bryggju og sostatt liggur Smyril í Nólsoyarfirði.

Hann fer tó aftur til bryggju eftir ferðafólki, bilum og farmi so at hann sleppur til Suðuroyar klokkan 13 eftir ferðaætlanini.

Hann siglur eisini norður aftur til Havnar úr Suðuroy klokkan 15.30 og suður aftur klokka n18.30 eftir ferðaætlanini.

Men seinasti túrurin úr Suðuroy til Havnar klokkan 21, verður ikki sigldur.

Tað er so ókyrt við bryggjuna í Havn, at skiparin heldur, at tað er óráð at lata Smyril liggja í Havn í nátt.

Tí verður hann liggjandi við bryggju á Krambatanga á Trongisvágsfirði og í morgin siglur hann sostatt sum sunnudag, tvs, at hann fer fyrsta túr úr Suðuroy klokkan 7 í mrogin árini.

